# Trailarahjól á ferð

**Bilurin gjørdist vrak, men førarin slapp snikkaleysur, tá eitt trailarahjól leyp av aksli sínum hósmorgunin**

FERÐSLUÓHAPP
*Jákup Mørk*

Tað kundi verið heilt galin endi, tá ein trailari hósmorgunin kom koyrandi suðureftir vegnum millum Fjarða.

Tá stóri bilurin í hevði tríggjar akslar á settivogninum skuldi fara um svingið við Fjarðará, loysnaðu tvey av hjólunum vinstrumegin fremsta aksilin, og hildu hesi síðani sína egnu leið.

Ein persónbilur kom um sama mundið koyrandi norður eftir vegnum, og við fullari ferð rendu vilstu hjólini frontalt á bilin.

– Tíbetur nýtti førarin trygdarbelti, og tí hendi eingin persónsskaði, men talan kundi lættliga verið um álvarsligan skaða, sigur vakthavandi á politistøðini í Runavík.

## Eingin staðfesting

Tað bar ikki til hjá vakthavandi at staðfesta neinuliga, hvør orsøkin var til óhappið. Ikki annað enn, at hjólini vóru loysnað.

– Hvør orsøkin til hetta er, vita vit ikki, og tað fáa vit ikki staðfest. Sjálvandi má tað ikki henda, at eitt hjól soleiðis loysnar, men tá hendingin er hend, so hava vit ongan møguleika at kanna, hvørt hetta var vegna vantandi eftirlit, ella um talan var um eitt brek av onkrum slag.

Sambært ferðslulógini, so kann í øllum førum staðfestast, at tað er førarin, sum hevur ábyrgdina av, at akfarið er í lagi. Tí er tað sjálvandi eisini uppgávan hjá hesum at ansa eftir, at hjólini eru forsvarliga spent fast.



*Sum tað sæst, so fekk personbilurin stóran skaða, tá hann og trailarahjólið rendu frontalt saman*
*Mynd: Jonhard Hammer*


J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo
WWW.SMYRIL-LINE.COM

PÁSKATILBOÐ
UPPLIVINGAR · STUTTLEIKI · MØGULEIKAR · HUGNI · FAMILJUSAMVERA

Tilboðini eru galdandi í tíðarskeiðnum 17. mars – 19. mai 2005

Danland hevur alt sum krevst til at tit og børnini fáa eina ógloymandi viku saman. Pakkið bilin, koyrið umborð, njótið undirhald, mat og tiltøk umborð og koyrið síðan úthvíld í land og beinleiðis til frítíðardepilin!

**Sera lætt og til henda prísin, næstan ov gott til at vera satt!**

Danland

1 VIKA Í DANLAND-ÍBÚÐ
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN & BIL
úr 7.395,-

**Íroknað er:** Ferðin fram og aftur í 4-koyggjukamari, innan, við wc/bað. Uppihald í Danland íbúð í 1 viku í Hirtshals, Ebeltoft, Blokhus ella Skagen Strand.

Av øðrum góðum tilboðum kunnu nevnast:

SKALLERUP KLIT
1 VIKA Í SUMMARHÚSI
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN & BIL
Prísir úr 7.995,-

SUMMARHÚSFERÐ
1 VIKA Í SUMMARHÚSI
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN & BIL
Prísir úr 6.590,-

RØNBJERG FERIEC.
1 VIKA Í SUMMARHÚSI
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN & BIL
Prísir úr 10.160,-

VIGSØ FERIECENTER
1 VIKA Í SUMMARHÚSI
FYRI 2 VAKSIN & 2 BØRN & BIL
Prísir úr 8.995,-

**Íroknað omanfyri nevndu tilboðum er:** Ferðin fram og aftur í 4-koyggjukamari við wc/bað, innan. Uppihald í 1 viku á nevndu gistingarstøðum. Við í prísinum er eisini reingerð við fráferð.

**Fjølbroytt undirhald verður á páskatúrunum 17/3 og 24/3** við millum øðrum Hannibal og ..., ja, gita hvørjum.

SMYRIL LINE

Droym tað ikki – royn tað!



Lesið
Sosialin
-so eru tit við!



26. - 28. apríl

Til messu í Brússel ...
European Seafood Exposition





Vit flúgva beinleiðis til Brússel!

Flogferð úr Vágum til/ úr Brússel.
Úr Vágum 25. apríl - heim úr Brússel 28. apríl
Kostnaður fyri hvønn íroknað flogferð, ferðaavgjald og gisting í 3 nætur u/ morgunmat:

í einkultrúmi á Bedford Hotel.... 11.280,-
í einkultrúmi á NH Atlanta Hotel.... 12.510,-

Bert flogferðin báðar vegir íroknað ferðaavgjald...... 6.810,-

Les meira á okkara heimasíðu flogfelag.fo

FLOGFELAG FØROYA
Áarvegur 6 · Tel 34 00 00 · www.ff.fo